Verkstaðið Vón:

# Ein livandi verkstaður

Herfinn Haraldsen og Valdemar Dam við 20 »prestum«, klárir at koyra til Landsverksfrøðingin



**Verkstaðurin Vón hevur 35 pláss og 40 brúkarar. Hetta vil siga, at teir 40 brúkararnir deilast um tey 35 plássini við tað, at onkur bert er á verkstaðnum hálva tíð. Sosialurin vitjaði í farnu viku á Verkstaðnum Vón á Argjum og fekk eitt prát við nakrar av brúkarunum har**

VERKSTAÐUR

*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Klokkan var júst farin av níggju fyrrapartin, tá Sosialurin kom niðan á Verkstaðið Vón á Argjum. Brúkararnir vóru júst farnir í steðg, so meginparturin av teimum sótu í matarhøllini og leskaðu seg við onkrum góðum.

Ógvuliga gott lív tóktist at vera í. Brúkararnir sótu runt í matarhøllini og prátaðu, og vóru teir ógvuliga skjótir og beinasamir at vísa okkum, hvagar vit skuldu fara.

Verkstaðið Vón hevur fýra ymiskar deildir. Tær eru: pappírsdeildin, seymideildin, timburdeildin og so har er eisini deild har tey hava evning.

Meginparturin av tí, sum verður framleitt á teimum ymsu deildunum, kanst tú keypa í krambúðini, sum er á sjálvum verkstaðnum.

Í løtuni fyrireika brúkararnir seg til tað stóru jólasøluna, sum stendur í durum.

## Stórtrívast

Allir brúkararnir á Verkstaðnum Vón búgva í Havn. Nakrir eru tó av bygd, men búgva teir í Havn mitt í viku, soleiðis at teir kunnu fara til arbeiðis.

Aftaná at hava gingið runt eina løtu og hugt runt á verkstaðnum, fingu vit eitt prát við nakrar av brúkarunum. Ein av teimum var 43 ára gamla Elinborg Hansen, sum er frá Norðagøtu, men dagliga heldur hon til á Marknagilsvegnum.

– Hvønn morgun kemur tann reyði bussurin við Jón Midjord eftir mær, sigur Elinborg.

– Hann kemur eftir mær hvønn morgun og heintar meg so aftur klokkan 16.00, og síðani koyrir hann meg aftur til hús.

Elinborg plagar at skifta um at vera á teimum ymsu deildunum. Viðhvørt er hon á seymideildini og viðhvørt er hon á pappírsdeildini.

Av tí, at Elinborg ikki sær so væl, so arbeiðir hon eisini á Blindastovninum hvønn týsdag og hósdag.

– Mær dámar ógvuliga væl at vera her. Og so havi eg eisini ein so fittan sjeik. Hann eitur Demmus, og hann hevur júst givið fløgu út við M´s Blues Band, fortelur Elinborg stolt.

## Ger hondarbeiði

Miriam Reinert er 30 ár og er úr Havn, har hon býr heima hjá foreldrunum.

– Men eg eri hálvur klaksvíkingur, er hon skjót at leggja afturat.

Eisini Miriam trívist væl á verkstaðnum. Hvønn morgun plagar hon at taka býbussin út á Argir, og tá klokkan er 16.00, tekur hon býbussin heimaftur.

Miriam møtir klokkan 9.00 um morgunin, og plagar hon at gera hondarbeiði á seymideildini. Eisini plagar hon at gera upphang.

– Hvørt týskvøld eri eg á kvøldskúla, og hóskvøld gangi eg til matgerð, fortelur Miriam.

## Mála »prestar«

Vit tosaðu eisini við tveir ungar dreingir, sum dagliga arbeiða á timburdeildini. Har gera teir »prestar« ella endurskinspelar, sum tað eitur.

Hesir ungu dreingirnir eru Herfinn Haraldsen, 27 ár, úr Havn og Valdemar Dam, 25 ár, úr Streymnesi.

Valdemar býr hjá beiggja sínum í Havn mitt í viku, tí annars hevði hann ikki sloppið til arbeiðis um morgnarnar.

Í løtuni heldur Herfinn til á frítíðarheiminum. Hetta kemst av, at foreldrini eru farin til Onglands í eina tíð.

– Vit plaga at taka býbussin til og frá Verkstaðnum, fortelja teir.

– Okkum dámar væl at vera her. Vit plaga at gera endurskinspelar til Landsverkfrøðingin, og mála teir reyðar og gular.

Tá Landsverksfrøðingurin ringir og sigur, at hann hevur brúk fyri meira pelum, so koyra teir til Kollafirðar við pelunum.

Verkstaðið Vón tykist at vera ein livandi Verkstaður. Brúkararnir ógvuliga fittur og fyrikomandi at tosa við. Uttan iva ein ógvuliga virkin verkstaður á Argjum.



*Elinborg Hansen úr Norðagøtu heldur til bæði á Verkstaðnum Vón og á Blindastovninum*



*Miriam Reinert úr Havn*



# Burturkast er tilfeingi

**– Alt kann endurvinnast, tað snýr seg um at skilja burturkastið sundur. Um fimm ár skilja vit uml. 25 prosent frá til endurnýtslu, av tí sum annars hevði farið til brennistøðina, sigur Poul Andrias Joensen, stjóri á brennistøðini hjá IRF, nú nýggj endurvinningarhøll er tikin í nýtslu í Leirvík**



*– Endamálið er, at vit í 2006 skulu skilja uml. 25 prosent frá til endurnýtslu, av tí sum annars hevði farið til brennistøðina, sigur Poul Andrias Joensen, nú nýggj endurvinningarhøll er tikin í nýtslu á Hagaleiti í Leirvík.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

ENDURVINNING

*Turið Kjølbro*

Burturkast er eitt gott barometur fyri, hvussu støðan er í landinum. Vaksandi nøgd av burturkasti stendur beinleiðis í lutfalli við vaksandi peninganøgdina í landinum. Og øvugt, minkandi nøgd, verri tíðir, sum vit sóu tær í nítiárunum.

Fyri fýra árum síðani varð greitt, at brennistøðin á Hagaleiti í Leirvík ikki fór at megna at taka ímóti alsamt vaksandi nøgdum av burturkasti. Burturkast varð sent til brennistøðina á Sandvíkarhjalla, men nøgdirnar av burturkasti eru øktar so mikið nógv, at Tórshavnar kommuna ikki megnar at brenna burturkast frá IRF frá 2003 at rokna.

– Vit høvdu tí valið ímillum at byggja eina nýggja brennistøð, at útbyggja brenniorkuna, at hyggja eftir øðrum møguleikum fyri at sleppa av við ruskið, ella bara lata standa til. Lótu vit bara standa til, høvdu vit longu komandi ár havt 4000 tons av burturkasti, sum vit ikki høvdu kunnað sloppið av við. Tí valdu vit at byggja endurnýtsluhøllina, sigur Poul Andrias Joensen, stjóri á IRF í Leirvík.

Í eina tíð og meðan endur nýtsluhøllin hevur staðið í gerð, hevur brennistøðin tikið ímóti ruski til endurnýtslu. Í fyrsta umfari valdi brennistøðin at endurnýta trol, dekk og stórsekkir, ið svarar til 550 tons um árið.

Endurnýtsluhøllin, sum nú er tikin í nýtslu, skal taka ímóti pappíri og pappi frá húsarhaldum og virkjum í IRF-økinum. Í Leirvík rokna tey við, at nøgdin í ár verður 600 tons, komandi ár 1800 tons og um eini tvey ár 2-3000 tons. Umroknað er hetta 40 ballir um dagin.

– Endamálið er, at vit í 2006 skulu skilja uml. 25 prosent frá til endurnýtslu, av tí sum annars hevði farið til brennistøðina, sigur Poul Andrias Joensen.

## Endurnýtslupláss

Veikasta liðið í IRF-økinum eru bingjuplássini, har privatu húsarhaldini sleppa sær av við rusk, sum ikki pláss er fyri í vanliga posanum. Hesi verða broytt til endurnýtslupláss, helst longu frá komandi ári, sum verða opin ávísar tíðir. Fyri alt skal eydnast væl, er umráðandi at fólk seta seg inn í, hvussu burturkast skal skiljast og hvat kann endurnýtast.

– Tað snýr seg um at venja fólk til hetta, og í tilfarinum, vit hava sent út, er góð kunning um, hvussu fólk eiga at gera. Alt kann endurvinnast, tað snýr seg bara um at skilja sundur, sigur Poul Andrias Joensen. Síðani fyrst í hesum árinum hevur Eiðis kommuna verið royndarkommunu hesum viðvíkjandi, og stjórin í IRF letur væl at úrslitinum.

– Fólk eru áhugað í einum reinari umhvørvi og eru meiri tilvitað um, at burturkast kann endurvinnast. Tað ger arbeiðið hjá okkum hugaligari, sigur Poul Andrias Joensen.

## Ikki helma í

Skulu vit framhaldandi hava tamarhald á vaksandi burturkastnøgdunum í Føroyum, ber ikki til at steðga á her, heldur Poul Andrias Joensen.

– Aðrar neyðugar íløgur mugu gerast í t.d. plastendurnýtslu, elektronikendurnýtslu, og eina skipan fyri lívrunnið burturkast, samstundis sum vit alla tíðina mugu arbeiða við at gera verandi skipanir betri. Vit mugu eisini læra okkum, at greinar, gras og seyðatøð ikki eru burturkast, men tilfeingi sum skal aftur í náttúruni.

Í hesum sambandi hevur IRF keypt eina kvørn til greinar og reint timbur, sum ætlanin er at leiga út til kommunur, virki og onnur, sum hava brúk fyri hesum.

## Dýrari enn ætlað

Nýggja høllin hjá IRF kostar 16,7 mió. krónur, sum er nakað meiri enn roknað varð við frammanundan. 15 mió. kr. av byggikostnaðinum eru fíggjaðar við lántøku frá Tryggingarfelagnum Føroyar, meðan restin 1,74 mió. kr. er eginfígging. Hesin kostnaðurin skal síggjast í mun til, at kostnaðurin av at byggja nýggja brennistøð, sum nú kann útsetast í nógv ár, hevði verið væl omanfyri 100 mió. kr. Leiðari og 4 fólk koma at arbeiða í skiljihøllini, meðan ein bilur við 2 monnum burturav kemur at heinta pappír og papp runt landið.

Tann, sum hevði roknað við at koma í eina stóra og fína høll á tremur við framkomnari tøkni, verður vónbrotin. Aðaltátturin við endurnýtslu er nevniliga ikki framkomnar tekniskar loysnir, men heldur at uppgávan verður løgd út til hvønn einstakan borgara, ið hevur til uppgávu at skilja alt væl sundur.



*Stórur dagur fyri umhvørvið, nú endurvinningarhøll er tikin í nýtslu. Á myndini Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Økingin ein lappaloysn

**– Tað er eyðsýnt, at tann ov lága játtanin til fólkaskúlan hevur álvarsligar avleiðingar fyri trivnaðin hjá lærarum og næmingum, sigur nevndin í Føroya Lærarafelag**

SKÚLABLAÐIÐ

*Turið Kjølbro*

Økingin til fólkaskúlan og sernámsfrøðiliga virksemið í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg komandi ár, er góðar 14 mió. krónur. Hetta er ein bati í mun til verandi fíggjarár, men so leingi játtanin ikki nøktar tann tørv, ið fólkaskúlanum krevst fyri at útinna fólkaskúlalógina í verki, er hetta bert ein lappaloysn, sum hvørki er fuglur ella fiskur, skrivar nevndin í Føroya Lærarafelag í oddagrein í Skúlablaðnum, sum júst er komið út. Og tað er eyðsýnt, at tann ov lága játtanin hevur álvarsligar avleiðingar fyri trivnaðin hjá lærarum og næmingum í fólkaskúlanum. Tískil hevur Føroya Lærarafelag sett ein bólk við serfrøðingi sum samskipara at kanna hesi viðurskifti. Kanningin fatar um allar lærarar og úrslitið av henni verður almannakunngjørt fyrst í komandi ári.

Í oddagreinini kemur nevndin eisini inn á óloystu viðurskiftini í savnsrøktini og KT-varðaøkinum, sum er partur av semjuni millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Av tí at hesi viðurskifti framvegis ikki eru loyst, hevur Føroya Lærarafelg noktað limum sínum at gera próvtøkuuppgávur til skrivliga próvtøkurnar komandi ár. Og felagið ætlar ikki at víkja frá hesi avgerð, sum um einki hendir, førir við sær, at eingin næmingur sleppur upp til roynd og próvtøku komandi ár.

At kommunurnar skulu umsita fólkaskúlan, heldur Føroya Lærarafelag lítið um. Onnur lond hava ivasamar royndir av tí, og hví skulu vit endurtaka mistøk, sum onnur gera, ístaðin fyri at læra av teimum, spyr nevndin í felagnum.